# Sambýlið Eiðisgarður – Samandráttur frá eftirlitinum

Eiðisgarður er eitt sambýli í Vági, ætlað vaksnum fólkum við sálarsjúku. Tilboðið lat upp í 2011 og hevur tíggju íbúðir. Íbúðirnar eru sjálvstøðugar og karmarnir góðir við felagshølum, køki, ítrivsstovu og venjingarútgerð. Arbeitt verður við støði í kognitivum og miljøterapeutiskum sjónarhorni, og dentur verður lagdur á tryggleika, virðing og trivnað. Starvsfólkahópurin er royndur og fakliga breiður, og arbeiðið er merkt av støðugleika og ábyrgd.

**Trivnaður og menning hjá húsfólkunum**
Húsfólkini á Eiðisgarði trívast væl og kenna seg trygg og vird. Dagligir fundir, felags máltíðir og húsfundir skapa ein struktur og felagsskap, har fólk kenna seg hoyrd og viðurkend. Starvsfólk hava tætt samband við húsfólkini og leggja dent á jaligt samskifti og at stuðla teimum í sambandi við familju og sosialar relatiónir. Tað sæst, at trivnaðurin er góður, men virksemið uttanfyri húsið er minkað orsakað av, at fleiri húsfólk eru eldri og hava avmarkaðan førleika. Tað ger, at menningin hjá teimum yngru húsfólkunum verður meira bundin at sambýlinum.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkum**
Starvsfólkini eru arbeiðssom og fakliga ágrýtin. Arbeiðið er merkt av ábyrgd, nærveru og eini menniskjaáskoðan, har virðing og trivnaður eru í miðdeplinum. Toymisarbeiðið gevur styrki og fakligan felagsskap. Skipanin við kontaktpersónstoymum gevur góða felags ábyrgd, men kann eisini gera tað ógreitt fyri húsfólkini, hvør teirra fasta kontaktfólk er. Faklig refleksión og dokumentatión eru til staðar, men kunnu styrkjast við meira regluligum háttalagi.

**Ætlan og virkisætlan**
Virkisætlanirnar eru væl grundaðar og vísa, at arbeiðið verður gjørt við støði í greiðum málum og endamálum, sum stuðla sjálvbjargni og lívsgóðsku. Tær eru sprotnar úr heilsulýsingum og verða skrivaðar og eftirmettar av toymum. Hetta tryggjar fakliga felagsábyrgd, men enn er tørvur á meiri regluligari skipan við dagfestum eftirmetingum, so arbeiðið verður livandi og dagført í samsvari við tørvin hjá húsfólkunum. Ætlanirnar vísa tó fakliga tilvitan og vilja til menning.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Starvsfólkini arbeiða við støði í KRAP, miljøterapi og kognitivari terapi, og felags grundarlagið er ein jalig menniskjaáskoðan. Tað sæst, at arbeiðið er merkt av etiskum tilviti og virðing fyri einstaklinginum. Samstundis eru arbeiðshættirnir ikki altíð nóg skipaðir ella dokumenteraðir, og tað námsfrøðiliga arbeiðið kann verða niðurraðfest, tá røktaruppgávur fylla nógv. Sambýlið hevur fakligan vilja og førleika, men tørvur er á at samantvinna arbeiðshættirnar meira, og skapa meiri innihald í dagliga lívinum hjá húsfólkunum.

**Organisatión og leiðsla**
Leiðslan á Eiðisgarði verður mett sum nærverandi, opin og faklig. Hon hevur góðan førleika og hevur megnað at skapa tryggleika og samanhang í starvsfólkabólkinum. Samstarvið millum leiðslu og starvsfólk er gott, og samskiftið er merkt av virðing og luttøku. Samstundis eru onkur organisatorisk viðurskifti ógreið, serliga viðvíkjandi ábyrgdarbýti.

Greiðari mannagongdir og betri yvirskipað skjøl, kundu styrkt fakliga strukturin og framtíðar menningina.

Eiðisgarður verður sum heild mettur, at vera eitt dygdargott og trygt tilboð við góðari fakligari grund og góðum trivnaði hjá húsfólkunum. Sambýlið er merkt av virðing, tryggum sambondum og starvsfólki, sum taka sítt arbeiði í álvara. Samstundis eru fakligir og organisatoriskir menningarmøguleikar, serliga í mun til arbeiðshættir, skjalfesting og virksemi til húsfólkini. Heildarmyndin er eitt vælvirkandi sambýlið við jaligum menningarmøguleikum og góðum førleikum, at tryggja trivnað og lívsgóðsku hjá húsfólkunum.

**Tilmælir og áheitanir frá Eftirlitinum**

Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Fyri at skapa meira innihald í gerandisdegnum, verður mælt til at leggja dent á virksemið, ið stuðlar sjálvbjargni og sosialari menning. Møguliga soleiðis, at tey húsfólkini, ið megna at fara úr húsinum, fáa hetta í boðið.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Roynt verður at stimbra húsfólkini til at fara út til eitthvørt, t.d. sosial tiltøk. Eisini við fylgjara, í tann mun starvsfólkanormeringin loyvir tí.

*Tað verður mælt til at seta ein høvuðskontaktpersón til hvørt húsfólk og at gera húsfólkunum greitt, hvør teirra kontaktfólk er. Síðani er møguligt, at kontaktfólkið hevur eitt toymi afturat sær.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Kontaktfólkaskipan hevur verið nýtt fyrr. Tá var mett, at kontaktpersónstoymir rigga betri. Almannaverkið fer í størri mun at leggja seg eftir at gera húsfólkunum greitt, hvat toymi tey hoyra til.

*Mælt verður til at dagføra virkisætlanirnar.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Dagfestingarnar fyri eftirmetingarnar verða skrásettar í kalendaranum soleiðis, at starvsfólk frameftir verða mint á, nær hetta skal gerast.

*Viðvíkjandi at geva húsfólkunum ein innihaldsríkan dag, so verður mælt til at seta meira virksemi á skrá gjøgnum dagin, og gera eina dagsskrá til hvørt húsfólk. Tað er vert at umhugsa, um virkisstovuarbeiðið eigur at verða víðka við fleiri starvsfólkum, ella at røktarstarvsfólk eisini eru tøk har.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Roynt verður altíð at bjóða húsfólkunum ein innihaldsríkan dag. Húsfólkini kunnu tó til tíðir vera torfør at motivera. Røktarstarvsfólkini eru eisini tøk í virkisstovuni í tann mun, hetta letur seg gera. Tvey føst størv fara vantandi at vera sett í januar 2026, og fer hetta at gera arbeiðið meira støðugt.

*Mælt verður til at gera yvirskipaði skjøl betur.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið fer at hyggja uppá, um yvirskipaði skjølini kunnu gerast greiðari.

*Mælt verður til at gera skjal, við býti ímillum ábyrgdina hjá leiðaranum og hjá starvsfólkunum.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Býtið millum ábyrgdina hjá leiðaranum og starvsfólkunum er lýst í hondbók hjá Almannaverkinum. Syrgt verður fyri, at tilboðið kennir til hesa.

*Mælt verður til at skriva niður og meta um ymisku uppgávurnar, sum skulu loysast av ymisku fólkunum á ymisku vaktunum.*

***Almannaverkið viðmerkir***
Farið verður undir at meta um, hvørt neyðugt er at skriva niður og meta um ymisku uppgávurnar, sum skulu loysast av ymisku fólkunum á ymisku vaktunum soleiðis, at hetta kann gerast greiðari.

*Eingin áheitan verður givin.*